## Deyðin kom úr rúmdini



Eitt altjóða granskaralið er komið til ta niðurstøðu, at dinosaurarnir vórðu útruddaðir, tí at ein risastórur rúmdarsteinur og jørðin stoyttu saman fyri 65 milliónum árum síðani. Nakrir av teimum 41 granskarunum, sum hava kannað málið, halda kortini, at teir seinastu dinosaurarnir doyðu av fleiri sera drúgvum eldgosum í Asia. Men teir flestu granskarnir halda, at dinosaurarnir vórðu útruddaðir, tá ein risastórur rúmdarsteinur, sum var um 15 kilometrar í tvørmát, rakti tað, sum í dag er Meksiko.

## Øði um yvirlýsing

Í Turkalandi eru fólk í øðini, tí at uttanríkisnevndin hjá amerikanska Umboðsmannatinginum hevur samtykt eina yvirlýsing, sum flokkar turkiska ágangin ímóti tí armenska fólkinum undir fyrra heimsbardaga undir hugtakið "hópmorð". Yvirlýsingin bleiv samtykt, hóast bæði Barack Obama, forseti, og turkiska stjórnin mæltu frá. 23 limir í uttanríkisnevndini atkvøddu fyri yvirlýsingini, og 22 atkvøddu ímóti. Turkiska stjórnin svaraði alt fyri eitt við at biðja sín sendiharra í Washington koma heim.



# Nýtt ungdómsvirksemi í Hoyvík

**Frítíðarvirksemi verður nú sett í verk fyri ungdóm í Hoyvík. Mentamálanevndin hjá Tórshavnar býráð hevur í dag einsmælt samtykt eina royndarskipan, sum byrjar longu um eina góða viku – tann 15. mars**

UNGDÓMUR

*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

- Okkara umsiting fyri børn og ung hevur eftir áheitan frá býráðnum mett um tørvin á frítíðarátøkum millum tey ungu í kommununi sum heild og mælir til tílíkt virksemi í Hoyvík beinanvegin, tí har er tørvurin størstur, sigur formaðurin í mentamálanevndini Jógvan Arge.

Virksemið verður í frítíðarskúlanum við Hoyvíkar skúla, sum skúlaleiðslan og leiðslan fyri frítíðarskúlan hava játtað at lata upp fyri ungdóminum eftir vanliga afturlatingartíð.

Í fyrstu atløgu verður talan um tveir dagar um vikuna, mánakvøld frá klokkan 18 til 23 og leygarkvøld frá klokkan 22 til 02 í tríggjar mánaðir sum ein royndarskipan. Aldursbólkurin er millum 13 og 18 ár.

Hesar tríggjar mánaðirnar verður arbeitt víðari við, hvussu hetta ungdómsvirksemið í Hoyvík kann skipast eftir einum føstum leisti í framtíðini. Haraftrat verður arbeitt víðari við møguleikunum aðrastaðni í kommununi.

Fólkatalið í Hoyvík veksur alsamt og barnatalið við. Jógvan Arge, nevndarformaður, sigur at kommunan hevur kannað møguleikarnar fyri sonevndum klubbvirksemi fyri børnum úr 3. til 6. flokk í Hoyvík. Hesin spurningur er ikki loystur enn, men arbeitt verður víðari við ætlanini, eitt nú í sambandi við, at Hoyvíkshøllin verður útbygd, sigur hann.

Í fjør heyst var ungdómstilboð sett í verk fyri ungdómin í Nólsoy. Har lata tey væl at átakinum hjá Tórshavnar Kommunu.





NÝTT SKEIÐ 18. MARS - PLÁSS EFTIR
SKEIÐ 19. MARS 2010 - ÚTSELT

**Blámusoppur og vánaligt inniumhvørvi**

**v/Teknologisk Institut**

- Eyðmerking av blámusoppi í bygningum, har væta er sloppin framat
- Nýggjasta gransking á økinum
- Topp 10 – mest vanligu brekini í nýggjum bygningum
- Hvussu skal blámusoppur í bygningum handfarast?
- Kanning av bygging og viðlikahaldsætlan
- Skeiðleiðari er Carsten Johansen, serfrøðingur frá Teknologisk Institut

Tilmelding
og les meira um skeiði á
www.synergi.fo ella ring 322 355

Synergi

Synergi - Tvørgøta 13 - 100 Tórshavn - www.synergi.fo - Tel. 32BELL (322 355)


# Skal listin stýrast? Og hvør skal stýra henni?

*Tíðindaskriv*

**Almennur fundur um list og almennar pengar verður í Miðlahúsinum mikukvøldið klokkan átta**

Tað eru ikki nógvir pengar, vit játta til listarliga skapan. Men nakrar milliónir eru tað kortini tilsamans.

Hvussu skulu hesir pengar brúkast? Skulu vit yvirhøvur, frá almennari síðu, stuðla list, sum ikki klárar at skapa sítt egna, fíggjarliga grundarlag.

Og um vit skulu stuðla list, hvussu skal tað so gerast? Hvør skal gera av, hvat skal stuðlast? Skulu tað vera politikarar? Ella embætisfólk í Mentamálaráðnum? Ella fólk við viðkomandi útbúgvingum?

Og hvørji skulu kriteriini vera? Hevur sokallað "góð" list, sum vendir sær til fá fólk, størri rætt til stuðul enn meira fólkslig list, sum fleiri fólk taka til sín?

Skulu vit, gjøgnum tann almenna stuðulin, stýra listini ein ávísan veg?

Hesir spurningar eru aktuellir, nú ætlanin er at umskipa Mentanargrunn Landsins, sum býtir út ein stóran part av pengunum til list í Føroyum. Og teir verða umrøddir á almennum fundi í Miðlahúsinum mikukvøldið 10. mars klokkan 20.00 undir yvirskriftini: Stýring ella villur vøkstur?

Við pallborðið sita fólk úr føroyska listaumhvørvinum, sum hava havt greiðar meiningar um hesar spurningar: Oddfríður Marni Rasmussen frá Listafólkasambandi Føroya, Inger Smærup Sørensen, listfrøðingur, umframt eitt umboð fyri Tjóðpall Føroya.

Tað er Tjóðveldi, sum skipar fyri fundinum.